# Fara at býta pengar út í komandi mánaði

*Strandferðslan, sjúkrahús og onnur, sum hava brúk fyri meiri peningi í ár, mugu brynja seg við toli, tí uppskot um eykajáttan verður ikki løgd fyri tingið heilt enn*

Áki Bertholdsen



Strandferslan bíðar og Suðuroyar Sjúkrahús bíðar. Og tað eru onnur, sum eisini bíða.

Tað eru fleiri almennir stovnar sum hava gjørt vart við, at tað er avgerandi neyðugt, at teir fáa meiri pening í ár fyri at fáa tað at mala runt, tí tað, sum tey fingu á fíggjarlógini fyri í ár, strekkir ikki til.

Men tey mugu øll bíða í tolni eitt sindur enn.

Tí tað verður ikki fyrrenn í næsta mánaða, at Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, fer at leggja uppskot fyri tingið um at eykajáttanir.

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sigur, at í ár er ætlanin at sleppa undan at enda í somu støðu, sum í fjør, tá ið ein hópur av eykafíggjarlógum vórðu lagdar fyri tingið.

Tí er tað gjørt av, at í ár verða tað bara tríggjar eykafíggjarlógir lagdar fyri tingið. Hetta varð boðað frá longu í heyst.

Og tann fyrsta av hesum verður løgd fram í komandi mánaði.

Fíggjarmálaráðharrin sigur, at seinasta vikuskiftið var freistin úti at koma við umbønum um eykajáttan til hesa lógina.

Hann er ikki beint nú greiður yvir, hvussu nógv ynski eru komin inn.

Men nakað liggur tó fast, og tað er, at umbøn er um at játta Strandferðsluni einar sjey milliónir krónur, so at hon ikki steðgar upp í ár.

Somuleiðis er tað greitt, at umbøn er frammi um at flyta sleppa at flyta 700.000 krónur av játtanini til rakstrurin á Suðuroyar Sjúkrahúsi, til lønir fyri at avmarka avleiðingarnar av teimum skerjingum, sum eru gjørdar á lønarjáttanini.

Um talan so harafturat verður um at játta Suðuroyar Sjúkrahúsi fleiri pening er enn óvist.

Men Karsten Hansen sigur, at tað verður arbeitt við málinum og hann sigur, at roynt verður sjálvandi at finna eina loysn, sum allir partar kunnu vera nøgdir við, sum hann málber seg.

Men, hvat hann meinar við, vil hann ikki útgreina.

Karsten Hansen sigur, at nú verða allar umbønirnar lagdar fyri landsstýrisfund, saman við einum tilmæli frá honum sjálvum.

Og ætlanin er so at leggja eykafíggjarlógina fyri tingið fyrst í komandi mánaði.

### Skulu ikki økjast

Men fíggjarmálaráðharrin sigur, at hóast ætlanin er at játta summum økjum fleiri pening, leggur hann stóran dent á, at talan verður ikki um at økja útreiðslurnar á fíggjarlógini.

– Tað er ógvuliga umráðandi at vit hava tamarhald á útreiðslunum og ikki geva ov leysar teymar.

Hann sigur, at hann tí fer at leggja dent á, at skulu summi øki hava meir, skal peningurin takast frá øðrum økjum.

– Og kann ein landsstýrismaður ikki finna peningin, hann skal brúka meiri til okkurt øki hjá sær sjálvum, á onkrum øðrum øki hjá sær sjálvum, má hann „læna“ frá einum øðrum landsstýrismanni.

Tað er kortini Løgtingið, sum hevur avgerðandi orðið, leggur hann afturat.

– Men fíggjarlógin er nógv hækkað seinastu árini, ikki minst á almanna- og heilsuøkinum og tað ber ikki til, at vit blíva við at hækka hana.

### Ikki rætti mátin

Annars dámar Karsten Hansen ikki hendan mátan, sum mangan verður brúktur nú á døgum fyri at kroysta meiri pening burturúr landskassanum.

– Í løtuni síggja vit alt ov ofta, at farið verður útum tey ymsu stýrini, beint í fjølmiðlarnar og til tingmenn við hóttanum um uppsagnir og aðrar avleiðingar og tað hjálpir oftani.

– Men tað er avgjørt ikki nøktandi, tí tað forðar okkum at leggja eina heildarætlan, sigur Karsten Hansen.

# Søgan um vindeygað

*Vatnsoyrar Snikkaravirkið skipar í hesum døgum fyri átaki í Vágum, har m. a. verður greitt frá søguni hjá H-vindeyganum*

Sveinur Tróndarson

Í gjár, í dag og í morgin skipar Vatnsoyrar Snikkaravirkið fyri átaki á Hotel Vágum.

Tiltakið er stórt - ikki færri enn 160 virkir og persónar eru boðin við og tí hava fyrireikararnir valt at halda tiltakið tríggjar dagar. Tá verður nevniliga rúmd fyri øllum.

Í gjár vóru fjølmiðlarnir bodnir at vera vælkomnir saman við timburhandlum. Í dag er túrurin komin til arkitektarnar og byggifrøðingarnar og í morgin standa byggimeistararnir fyri tørni.

Fyri nógvum árum síðani byrjaði Vatnsoyrar Snikkaravirkið við H-vindeyganum og tað er í hesum sambandi, at teir skipa fyri tiltakinum, sum er ein gjøgnumgongd av søguni hjá vindeyganum.

Fleiri fyrilestrar verða hildnir og m.a. fer Gunnar Hoydal at hugleiða um gluggar, flas og vindeygu í føroyskari bygging.

Eisini fer Helge Havnes, sum er leiðari á menningardeildini hjá Spilka as í Ålesund at greiða frá upprunanum til svingvindeygað og fyrimunirnar við nýggja profilinum.

Djóni Ziska, leiðari á Føroya Termovirki í Tórshavn, fer at greiða frá fyrimununum við orkurútunum í mun til vanligar termorútar.

Umframt at halda fyrilestrar á Hotellinum, verður eisini ein rundtúrur á Vatnsoyrar Snikkaravirkið og hjá Føroya Glugga í Miðvági.

Hóast nógv er á skránni, er eisini pláss fyri at gestirnir fáa sær ein bita og tí skipa vertirnir eisini fyri. Aftaná náttverðan, sum verður klokkan 18.00, verður farið aftur til húsa.



*Finn Petersen og Emma Heinesen bjargaðu fyrradagin lívinum á einum 70 ára gomlum manni í Klaksvík*

**Mynd: Dávur Winther**

# Bjargaðu lívinum á 70 ára gomlum manni

Emma Heinesen og bróðir hennara, Finn Petersen, bjargaðu fyrradagin lívinum á einum 70 ára gomlum manni í Klaksvík.

Maðurin var dottin á sjógv við bátabrúgvarnar, og tá tey bæði systkini komu til, var maðurin longu druknaður.

Men Emma, ið er útbúgvin ferðaleiðari, og tí-skil eisini hevur prógv í fyrstu hjálp fekk lív í aftur mannin við and geva honum kunstigan andadrátt. Maðurin varð fluttur og Klaksvíkar Sjúkrahús og livir nú væl.

## Viðmerking:

# Fiskidagabankin

Tað kann tykjast løgið, tá sagt verður, at fiskurin, ella rætturin til at fiska, er fólksins ogn. Tí tá ið ein reiðari kann fá fiskidagar uttan at hava goldið fyri teir, so dugi eg ikki at skilja, hví teir skulu eiga dagarnar og selja teir, sum teimum lystir. Teir siga, at skipini verða virðisleys, um teir ikki eiga fiskidagarnar. Men tað er jú skipið, sum skal hava fiskiloyvi fyri at fáa fiskidagarnar, og ikki maðurin ella reiðarin.

Sum nú er, kann ein skipaeigari selja skipið og eiga rættin til at selja fiskidagarnar til onkran, sum kanska ætlar at byrja av nýggjum. Og hettta kann hann gera í 10 ár.

Soleiðis eigur tað ikki at vera.

Búskaparráðið kom við einum uppskoti um fiskidagabanka. Uttan at vera samdur við Búskaparráðnum, so haldi eg, at orðið banki kann brúkast. Soleiðis at skilja, at teir, sum fáa fiskidagar úr hesum banka, eiga at fáa so mangar, sum teimum tørvar. Eru tað fiskidagar, sum ikki verða brúktir, skulu teir koma aftur í bankan, sum so aftur kann lata hesar óbrúktu dagarnar til teir, sum mangla dagar.

Og tað skal ongantíð verða goldið fyri dagarnar. Um ein eigari gevst, kann hann selja skipið við fiskiloyvi, tí tað skal fylgja við skipinum, sum so fær fiskidagar úr fiskidagabankanum.

Vit síggja tað best, hvussu tað gongur við Íslandskvotuni. Tað er fiskur, sum vit fáa fyri einki frá íslendingum. Kvota verður býtt út á so og so nógvar bátar. Summir eru hugagóðir og fara avstað og fiska sín part upp. Teir kundu hugsað sær størri kvotu, men fáa tað ikki, tí tað eru bátar ímillum, sum ikki fara til Íslands at fiska. Men hesir, sum ikki fara, eiga kvotuna. So um nakað skal fáast aftrat hjá teimum, sum veruliga fiska undir Íslandi, noyðast teir at keypa frá teimum, sum ikki tíma yvir. Ja, tað er onkur bátur, sum fyri fleiri árum síðan var til fiskiskap undir Íslandi, men sum nú bara trolar undir Føroyum. Hann kann selja Íslandskvotu á hvørjum ári.

**Jákup A. Joensen**
**Eiði**





*Gunnbjørn Joensen, reiðari, Rógvi Mouritsen, frá Fiskirannsóknarstovuni og Johan Mortensen, sølumaður við tí fyrsta villa føroyska laksinum, sum er veiddu í skjótt 10 ár til útflutnings*

**Mynd Jan Müller**

# Fyrsti villi føroyski laksurin í skjótt 10 ár fær metprís

*Fyri fyrstu ferð í níggju ár hava føroyingar aftur veitt villan laksan á opnum havi til vinnuligt endamál. Gravgangur er eftir villa laksinum, sum hevur ein prís oman fyri 60 kr. kilo netto ella meira enn tvífalt prísin á aldum laski*

Jan Müller

Føroyingar eru nú aftur farnir at veiða villan laks til útflutnings - eftir ein steðg í skjótt 10 ár. Nú um dagarnar kom Túgvusteinur hjá reiðaríinum Thor í Hósvík til lands við tí fyrsta laksinum, eftir at føroyingar í fingu tillutaða eina kvotu uppá 260 tons.

Laksurin er longu seldur og tað til metprís. Tað er Baldur í Havn, sum hevur selt laksin eitt nú til USA og liggur nettoprísurin oman fyri 60 kr. kilo ella væl meira enn tað dupulta av prísinum fyri aldan laks.

Túgvusteinur fór út 24. januar og hevur roynt heilt norður móti 200 fjórðingamarkinum og eisini longur suðuri, einar 50 fjórðingar úr landi. Teir høvdu einar 20 setur og er ikki heilt tað stóra komið burtur úr orsakað av veðrinum. Tað hevur verið øgiliga baldrutt. Tað vísti seg tó, at setan næst Føroyum var tann besta.

Gunnbjørn Joensen, sum starvast hjá Thor sigur, veiðan hjá Túgvusteini var uppá 5,8 tons. Meðalvektin fyri teir umleið 1400 laksarnar er 4,3 kilo. Størsti laksurin vigaði 12,1 kilo. Laksurin sær gott út.

Tað er greitt, at mong eygu er vend móti hesum fyrsta føroyska laksatúrinum í skjótt 10 ár. Er talan um eina nýggja laksatíð fyri føroyingar verður spurt? Hjá Thor hava teir drúgvar royndir við laksaveiðu. Túgvusteinur, sum var fyrstur at seta hol á aftur hesar fyri føroyingar fyrr so týðandi vinnu, gavst við laksaveiðuni í mars 1991. Einasta laksaveiðan, sum hevur verið hesi árini, er royndarveiða.

Higartil er bert eitt loyvi latið til laksaveiðu. Gunnbjørn Joensen sigur, at tað hevði verið gott, um eisini onnur loyvi vórðu latin, tí tað hevði gjørt tað lættari at leita. Økið er so vítt og stórt, og tað er ringt at leita einsamallur.

Í dag eru tað bert føroyingar, sum hava loyvi at veiða villan laks í Norðuratlantshavi. Thor søkti annars um tvey loyvi, nú teir hava fleiri skip. Men teir hava so bert fingið ta eina loyvið.

Hann sigur annars, at tað nú er at vóna, at føroyingar aftur av álvara seta skjøtil á laksaveiðuna. -Troyta vit ikki laksin nú, so vænti eg, at henda veiða verður slept fyri altíð. Uppá fyrispurning hvussu stovnurin er fyri sigur Gunnbjørn Joensen, at laksurin nú hevur fingið frið í skjótt 10 ár, og tað skuldi givið laksastovninum ein góðan møguleika at verða komin fyri seg.

Ein av orsøkunum til at føroyingar góvust við at veiða laks vóru tilboðini hjá frítíðarveiðumonnum í bæði Íslandi og USA um at friða laksin og fyri hetta rindaðu teir stórar upphæddir til teir, sum høvdu loyvi.

Tríggir av teimum 1400 laksunum vóru merktir, allir í Noregi. Tá laksaveiðan undir Føroyum var uppá tað mesta var hon oman fyri 1200 tons. Hóast kvotan nú bert er 260 tons, so heldur Gunnbjørn Joensen kortini, at hetta skuldi verið nóg mikið til trý skip. Við Túgvusteini eru sjey mans.

Laksurin hjá Túgvusteini er lagdur upp í Kollafirði, har hann verður goymdur í kuldagoysmlu, áðrenn hann skjótt fer víðari til roykingar aðrastaðni. Johan Mortensen, sum í dag starvast í oljuvinnuni, hevur eina fortíð sum fiskaseljari, og hóast oljuvinnan dregur, so fer stórur partur av frítíðini til gamla yrkið. Hann hevur selt laksin til keyparar í USA.

Týsdagin varð Rógvi Mouritsen, bioglogassistentur á Fiskirannsóknarstovuni í Kollafirði saman við sølumanni og reiðara fyri at hyggja eftir villa laksinum. Rógvi Mouritsen, sum hevur drúgvar royndir við og kunnleika til laks, bæði villan og aldan, sigur, at talan er um góðan og sunnan fisk. Laksurin sær út sum hann plagar. Tað er tann vanliga støddin, fitin er tann sami og konditiónsfaktorurin somuleiðis.

Millum villa laksin vil altíð vera aldur laksur eisini. Kortini vóru ikki nógvir av tí slagnum millum teir laksarnar hann sá í Kollafirði. Rógvi sigur, at tað vit kenna til frá royndarveiðuni miðskeiðis í 90-unum so var umleið 30% av veidda laksinum aldur laksur. Hetta er laksur, sum er sloppin úr nótunum.

Hóast lítil munur er á alda og villa laksinum, so fæst nógv hægri prísur fyri alda laksin. Johan Mortensen, sum hevur selt bæði villan og aldan laks, er sera fegin um, at føroyingar eru farnir at fiska laks aftur, tí stórur eftirspurningur er eftir tí villa laksinum. Ein kann siga, at villi laksurin er tann mest umbidni, ikki minst tí hann hevur livað í náttúrligum umhvørvi. Hetta er nakað, sum fleiri keyparar og her serstakliga dýr matstøð geva nógv fyri at fáa hendur á. Johan Mortensen heldur hetta hevur nógv at gera við ta grønu alduna, sum er við at mennast kring heimin. Fólk vanda sær um, hvat tey eta. Hann vísir á, at á sama hátt, sum at fólk eru farin at leggja um bæði royki- og drekkivanar, eru tey eisini farin at hugsa meira um, hvat tey eta, og hvaðani maturin stavar.

-Hetta er eitt 100% náttúrprodukt, sum nógvir keyparar vilja geva sera høgan prís fyri, og eg haldi, at vit føroyingar eisini eiga at leggja okkum eftir hesi rókini, sum er partur av tí vistfrøðiligu - økologisku - bylgjunar, sum er við at fara um allan heim.